## Tónleikur

# – Halt høvdið kalt og ley




*Í vikuskiftinum skulu The Ghost spæla í Århus Pakhus og á Nordklang Festival í Sveis. Í apríl í Danmark við Boys in a Band og í juni í Glasgow*

*Mynd: Heiðrik á Heygum*

**Eitt ára gamlir hava teir longu fingið fleiri tilboð um plátusáttmála, drukkið kaffi saman við Bloc Party, ligið á hitt-listanum hjá NME beint undir Justin Timberlake og spælt á nøkrum av fremstu og mest alternativu evropeisku tiltøkunum. Men hvørjir eru teir, og hvat vilja teir við tí, sum teir gera?**

SAMRØÐA
*Sunneva H. Eysturstein*
*post@sosialurin.fo*

- Vit vilja spæla tónleik fyri fólkinum. Men tað skal vera fyri fólki, ið dámar okkara tónleik. Eg vil heldur spæla fyri 10 persónum, ið veruliga dáma mín tónleik, enn fyri 100 persónum, ið bara lurta fyri at lurta, ella sum bara koma fyri navnið, sigur Filip Mortensen, sangari og gittarspælarí í The Ghost

Føroyskur tónleikur ger nógv um seg úti um landoddarnar. Ein av bólkunum, ið øgiliga skjótt klívur upp stjørnustigan, er The Ghost. Men hetta er eisini ein bólkur, ið vit hoyra lutvíst lítið um her heima. Nú er tíðin komin til at varpa ljós á ungu mennirnar handan bólkin; Filip og Urbanus, ið eru so ymiskir av lyndi og í stíli, sum nøvnini hjá teimum benda á.

### Ger tað frá hjartanum

Filip Mortensen er sangari og gittarspælari í The Ghost. Spurdur, hvat hann vil við tónleikinum, leggur hann hart út við at greiða frá hjartamálum sínum.

- Um tú gert tað, ið tú gert, frá hjartanum, skal tað nokk ganga. Fyri at kunna tað, er neyðugt at seta sær mál, høg mál. Eg havi fyrr verið í tí støðuni, at eg havi sett mær ov stutt mál, og tað kom eisini aftur um brekku. Eg haldi, at tað er eitt rættiliga typiskt føroyskt fyribrigdi at bíða og ikki ordiliga vita ella tora. Við The Ghost avgjørdi eg beinanvegin, at hetta skuldi eg gera 100 prosent.

- Vit eru komnir langt uppá stutta tíð. Tað, sum vit hava viljað, hava vit gjørt. Vit settu okkum nøkur rættiliga abitiøs mál á sumri í fjør og fingu strike hvørja ferð. M.a G! 2007, at spæla uttanlands, áðrenn árið var av, og at sleppa á Iceland Airwaves festivalin, sjálvt um